# Sleppa at byggja meiri út enn ætlað

**Landsstýrið er sinnað at hækka útbyggingarkvotuna hjá kommununum eitt sindur so at tær fáa bygt meiri út, enn upprunaliga ætlað**

KOMMUNALAR ÚTBYGGINGAR
*Áki Bertholdsen*



*– Vit eru við at nærkast, og vónandi finnu vit semju á næsta fundi, sigur Jógvan Krosslá*

Tað er nú greitt, at kommunurnar sleppa at byggja meiri út enn upprunaliga ætlað eftir útbyggingarkvotuni, sum landsstýrið ásetti.

Landsstýrið hevði annars gjørt av, at tilsamans skuldu kommunurnar ikki byggja út fyri meiri enn 190 milliónir komandi ár.

Men hetta elvdi til stóra misnøgt, serliga hjá summum av teimum stóru kommununum. Tær siga, at eftir at alt hevur ligið stilt alla kreppuna, er tørvurin stórur á at fáa samfelagið upp undan aftur, nú tað er farið at ganga fram á aftur og tí er stórur tørvur á útbyggingum.

Jógvan Krosslá, formaður í Kommunusamskipan Føroya, sigur, at kommunurnar hava tí roynt at fáa Landsstyrið at góðtaka, at útbyggingarmarkið verður hækkað.

– Kommunurnar eru ikki ósamdar í, at tað eigur at vera mark fyri, hvussu nógvar útbyggingar kunnu gerast um árið fyri ikki at missa tamarhaldið á búskapinum. Tað er heldur ongin ivi um, at undir vanligum umstøðum høvdu vit so dánt klárað okkum við 190 milliónir um árið.

– Men hetta eru ikki vanligar umstøður, tí nógv liggur á láni, sum tað er bráðneyðugt at fáa gjørt, eftir at alt hevur ligið lamið í kreppuni. Tí hava vit roynt at fáa Landsstýrið at hækka útbyggingarmarkið, sigur formaðurin í Kommunusamskipanini, har seks tær størstu kommunurnar eru limir.

## Sleppa at byggja meiri

Kommunusamskipanin hevur havt nakrar fundir við Landsstýrið um málið og nú er líkt til, at vend er komin í.

– Eitt nú hava vit skotið upp, at havnaútbyggingar ikki skulu telja upp í útbyggingarkvotuna. Í øðrum lagi hava vit skotið upp, at útbyggingar í Havnir verða vektaðar, so at tær ikki telja fult. Eitt nú hava vit skotið upp, at utbyggingar í Havnir skulu ikki telja meiri enn 25%.

Tvs, at byggir ein kommuna havn fyri 10 milliónir, skulu bara 2,5 milliónir av teimum teljast við í útbyggingarkvotuna og at kvotan sostatt kann hækkast 7,5 millión.

Jógvan Krosslá sigur, at á tí seinasta fundinum Landsstýrið, gekk tað kommununum partvíst á møti.

– Landstýrið boðaði frá, at tað kundi góðtaka, at havnaútbyggingar blivu vektaðar 50%, sigur formaðurin í samskipanini.

Hann sigur, at fundur skal aftur verða við Landsstýrið í næsta mánaða og at semja vónandi tá fæst á, hvussu nógv útbyggingar í havnir skulu vektast, men at Kommunusamskipanin fer at gera sítt til, at tær verða vektaðar 25%, ella har niður ímóti.

# MBF føðingardag í dag

**Felagið varð stovnað ST-dagin í 1981. Norðurlandahúsið er karmur um føðingardagin**

FØÐINGARDAGUR
*Turið Kjølbro*



*Absalon Áargarð, Anna Sofía Restorff og Palli Hansen at undirhalda við dukkum og sangi við teknum*

Rundi føðingardagurin hjá Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum verður hátíðarhildin í Norðurlandahúsinum í dag. Í morgun kl. 10 verður undirhald fyri teimum triðju flokkum, sum hava meldað seg til. Tá fer Absalon Áargarð, Anna Sofía Restorff og Palli Hansen at undirhalda við dukkum og sangi við teknum. Harafturat verður sangur og drama við børnunum úr "Eg eri ein K". Kl. 12 til kl. 13.30 fara triðju flokkarnir í Ítróttarhøllina á Nabb at hoyra ÍSB greiða frá um ítrótt fyri brekað. Næmingarnir fáa høvi at royna nakrar ítróttargreinir. Børnini fáa ís og topptopp.

Seinnapartin millum kl. 13 og kl. 17 verður í Klingruni høvi hjá almenninginum á fýra básum at kunna seg um, hvat feløgini hjá MBF standa fyri, hvørji tey eru, og hvat tey kunnu brúkast til. Harumframt eru tríggir aðrir básar, ið vísa ljóðbøkur, og annað tilfar.

Tríggir fyrilestrar verða hildnir í Dansistovuni, ein um psyku, rørslu og rørslulag, ein um nútímans samskiftistøkni, og tann síðsti um heilivág nú og í framtíðini.

Kl. 14 verður sangur og tónleikur í Klingruni, og kl. 16 verður stuðulin frá fløguni "Vælskapt brek" handaður MBF og ÍSB. Doris Hansen, forkvinna í MBF, heldur røðu, og orkestrið "Ælabogin" endar dagin.

Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum, MBF, varð stovnað 24. oktober 1981, sjálvan ST-dagin. 1981 varð lýst at vera Ár teirra brekaðu. Seks feløg vóru tá fyri brekað í Føroyum, og hesi tóku seg saman í ein arbeiðsbólk fyri at vísa á uppgávur og tørv hjá fólki við brekum í Føroyum. Feløgini vóru: Bjørg, Deyvafelagið, Føroya Blindafelag, ÍSB, Javni og Sclerousfelagið. Helena Samuelsen úr Javna varð vald til forkvinnu, og Karin Margreta Joensen-Næs varð skrivari. Nógv tiltøk og fundir vóru kring landið. Arbeiðið er væl lýst í bókini Ár teirra brekaðu, sum arbeiðsbólkurin gav út í 1982. Eitt annað úrslit av góða samstarvinum millum áðurnevndu feløg varð stovnanin av einum meginfelag. Í dag eru 22 feløg í MBF.



# Rættiliga ymisk tilboð

**Tilboðini upp á koyringina hjá Bygdaleiðum vórðu latin upp mánadagin. 20 tilboð komu inn, og tað er á leið tað, roknað var við, sigur fólkaflutningsleiðarin á Strandferðsluni**

BYGDALEIÐIR
*Edvard Joensen*



*Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari, letur eitt av tilboðunum upp*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er helvtarmunur á tilboðunum á onkrum av bussrutunum hjá Bygdaleiðum. Tilboðini vórðu latin upp seinnapartin mánadagin, og tey vóru á leið tað í tali, sum roknað var við frammanundan, sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari hjá Strandfaraskipum Landsins.

Farið verður nú at hyggja nærri at tilboðunum, sum komin eru, og um eina viku ella so, verður helst møguligt at siga nakað nærri um, hvussu koyringin verður latin út, sigur Poul Jákup Thomsen.

## Stórur munur

Sjónskastur var munurin millum tilboðini upp á koyringina í tveimum av smærru økjunum, Sandoy og Suðuroy. Í Sandoy var helvtarmunur, meðan munurin í Suðuroy var upp á 40 prosent millum tað dýrasta og tað bíligasta tilboðið.

Tað komu trý tilboð inn upp á koyringina í Suðuroy. Tað bíligasta var upp á 4.950.000,- krónur, meðan tað dýrasta var upp á 8.244.043,80 kr. Ímillum lá eitt upp á 5.879.751,- krónur.

Upp á koyringina í Sandoy komu eisini trý tilboð. Har er tó tað at siga, at tvey teirra vóru frá sama tilboðsgevara og líktust heilt nógv. So nógv, at tað kanska í roynd og veru ber til at tosa um eitt og sama tilboð. Munurin teirra millum er góðar 50.000.- krónur.

Hinvegin er hitt tilboðið upp á kr. 3.331.212,-, sum er umleið tað dupulta av tí lægra hjá tí fyrrnevnda bjóðaranum. Tað tilboðið var upp á kr. 1.561.300,37 krónur.

Upp á koyringina í Norðoyggjum kom bara eitt tilboð, sum ljóðar upp á kr. 4.519.125,- krónur.

Hinvegin vóru tilboðini upp á koyringina í Vágum, Eysturoy og Streymoy nøkulunda á leið í prísi. Tó var eitt útsving í tilboðunum upp á leið 400 millum Leirvík og Tórshavn.

Tann, sum hevði lægsta boðið, beyð 3.775.000,- krónur, meðan hægsta boðið var upp á kr, 6.800.000,- sum næstan er ein helvtarmunur.

## Sum væntað

Fólkaflutningsleiðarin hjá Strandfaraskipum Landsins, Poul Jákup Thomsen, sigur, at av teimum 30, sum fingu útbjóðingartilfar frá Strandferðsluni, hava 20 boðið upp á koyringina.

– Tað var á góðari leið tað, vit høvdu væntað, sigur hann.

Hann sigur eisini, at tað hevur víst seg, júst sum væntað, at fleiri teirra, sum áður hava koyrt bussar hjá Bygdaleiðum, hava boðið saman upp á ymsar rutur. Ein stendur sum høvuðsbjóðari, meðan hinir so eru undirveitarar við sínum bussum, tilreiðar at røkja rutuna fyri tann, sum fekk hana.

Hinvegin eru nakrir bjóðarar, sum hava boðið einsamallir. Hesir eru í stóran mun slíkir, sum ikki hava havt koyring fyri Bygdaleiðir fyrr. Ymisk feløg, sum hava boðið seg fram. Og í fleiri førum – tó ikki øllum – liggja hesi feløgini hægri enn teir etableraðu bussførararnir í prísi.

Nú verður so farið at hyggja nærri at boðunum, sigur Poul Jákup Thomsen. Kannað veður eftir, um allir tilboðsgevararnir lúka tær ásettu felagsreglurnar fyri at fáa koyring. Tær eru ásettar í útbjóðingartilfarinum. Eisini onnur viðurskifti verða kannað, áðrenn nakar fær loyvi at koyra, sigur hann.

Júst tað, at treytir eru settar við í útbjóðingartilfarinum ger, at Strandferðslan kann treyta sær at velja tann, sum hildið verður at hava bestu vónir fyri at klára at røkja rutuna. Bæði fíggjarliga og við øðrum førleikum, so sum tænastu, góðum bussum og so framvegis.

Men alt hetta verður komið aftur til, tá ein endalig støða fyriliggur, sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari hjá Strandfaraskipum Landsins.

Jógvan við Keldu, tingmaður:

# Formansskapurin ger ov nógv av

**Tað er óneyðugt við vápnaðum vaktarhaldi í løgtinginum, sigur Jógvan við Keldu, løgtingsmaður, sum heldur, at formansskapurin í tinginum hevur yvirreagerað eftir hendingina fyri 10 døgum síðani**

TRYGD
*Eyðun Klakstein*



*– Sjálvt um at tú verjir teg so væl, sum tú kanst, so kunnu slíkir tilburðir koma fyri, men teir eru sera sjáldsamir. Tí er tað skeivt at seta vápnaðan løgreglumann at halda vakt í tinginum, heldur Jógvan við Keldu*

Tað eru ikki allir løgtingsmenn, sum eru glaðir fyri nýggja vaktarhaldið í løgtinginum.

Tað var eftir hendingina fyri 10 døgum síðani, tá ein maður eftir øllum at døma ætlaði at gera seg inn á ein tingmann, at formansskapurin tók trygdina hjá løgtingsmonnunum til viðgerðar.

Úrslitið var, at á næsta tingfundi stóð vápnaður løgreglumaður á varðhaldi í gongini.

Hetta heldur løgtingsmaðurin Jógvan við Keldu er at fara ov langt.

– Eg haldi, at formansskapurin hevur yvirreagerað, og eg eri ímóti slíkum vaktarhaldi í tinginum, sigur hann.

## Kennir seg tryggan

Jógvan við Keldu sigur, at hann kennir seg tryggan at fara til arbeiðis í tinginum fyri tað um einki vaktarhald er.

– Føroyingar eru eitt friðarfólk, og vit hava eitt lítið land, har slíkar hendingar sera sjáldan koma fyri. Hóast hesa hendingina í tinginum, kenni eg meg púra tryggan, tá eg eri til arbeiðis í tinginum, sigur hann.

– Hóttanin kann altíð koma frá sjúkum ella ávirkaðum fólki, og vit skulu hugsa um, at tað eru nógvir aðrir stovnar, sum kunnu krevja líknandi vaktarhald. Tað hevur løgreglan ikki orku til.

– Eru tað fólk, sum eru drukkin, óð ella sjúk, so er tað neyvan rætti mátin at møta teimum við einum vápnaðum vaktarmanni. Tað kann eisini provokera og kanska elva til óneyðugar tilburðir.

## Kann koma fyri

Jógvan við Keldu hevur verið í politikki í 30 ár, og hann hevur eisini sitið í fleiri heitum sessum – millum annað sum borgarstjóri í Klaksvík í 16 ár.

– Eg havi sjálvandi verið úti fyri onkrum hesi árini, men vit skulu ansa eftir, at vit ikki gera ov nógv av og leggja hetta á eitt støði, har tað ikki hoyrir heima, sigur hann.

– Sjálvt um at tú verjir teg so væl, sum tú kanst, so kunnu slíkir tilburðir koma fyri, men teir eru sera sjáldsamir. Tí er tað skeivt at seta vápnaðan løgreglumann at halda vakt í tinginum.

Jógvan við Keldu heldur, at tá nýggja løgtingshúsið verður klárt, fara fólk at arbeiða í móttøkuni, og tey kunnu boða frá, um okkurt serligt er áfatt.